## Páll og Erling á vøllinum

Tveir av ungu føroysku spælarunum í Fremad Amager komu á vøllin í toppdystinum í 2. Deild Eystur um vikuskiftið. Erling Jacobsen hevur onkra ferðina áður roynt seg, og hesaferð slapp Páll Klettskarð eisini framat seinastu løtuna. Fremad Amager spældi ímóti Brønshøj og vann 2-1. Anders Jochumsen skoraði bæði málini hjá Fremad Amager, sum liggur á odda í deildini, nú liðini fara í vetrarfrí.



## B68 ger avtalur við unglingar

B68 hevur gjørt avtalur við tríggjar ungar spælarar í felagnum. Hesar avtalur eru galdandi fyri kappingarárini 2008 og 2009. Leikararnir, sum tað snýr seg um, eru Remi Langgaard, Emil Olsen og Jonleif Højgaard. - Hetta eru tríggjir evnaríkir ungir leikarar, sum eru uppvaksnir í felagnum og sum vit vænta okkum nógv av, sigur Jógvan Højgaard, nevndarformaður.

SÍ – Dráttur 3-1 (25-21, 25-11, 15-25, 25-7):

## SÍ fór framvið Drátti

**SÍ vann sær rættin til at reypa í Vágum, tí sunnudagin vunnu tær móti grannunum úr Drátti**

FLOGBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

SÍ vístu styrki og vunnu tryggan sigur uppá 3-1 móti grannunum úr Drátti. Við sigrinum kundi SÍ eisini fara framvið grannunum á stigatalvuni, við einum dysti til góðar. Sørvágs kvinnur hava eisini hála seg upp á sama stigatal sum ÍF, men har er ÍF í teirru støðu, at tær hava ein dyst færri enn SÍ.

SÍ byrjaðu betur, og vunnu tær eisini tvey tey fyrstu settini. Tað triðja settið fór Dráttur avstað við, men í fjórða settinum settu SÍ kvinnurnar Drátt upp á pláss og vunnu sikkurt. Sostatt at endaliga úrslitið gjørdist ein tryggur sigur.

Var fyrsta settið javnt, var ongin ivi um næsta sett. Vertirnar vunnu næsta sett við stóra muninum 25-11. Triðja sett tóktust SÍ at taka sær av løttum, samstundis sum Dráttur rættuliga kom í gongd. Drátturs kvinnur vunnu hetta settið 15-25. Fjórða settið var ongin ivi yvirhøvur. Tí við rungandi tryggum sigri uppá heili 25-7, vunnu SÍ settið og harvið eisini dystin.

Dráttur er við hesum úrslitinum dottið niður á triðja pláss eftir fimm dystum, meðan SÍ, ið fyrr lá á triðja plássi, hevur yvirtikið annað plássið frá Drátti.

Fleyr – TB 0-3 (22-25, 14-25, 9-25):

# TB fingið gongd á

**Nú er TB komið á talvuna, eftir at teir fyrstu tríggir dyatirnar hava verið soltnir, hvat stigum viðvíkur**

FLOGBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Dysturin í Gundadalshøllini sunnudagin, endaði við tryggum 0-3 sigri til gestirnar av Tvøroyri, og harvið er TB komið á stigatalvuna eftir trilvandi byrjan.

### Aftur tap til Fleyr

Fleyr hevur í ár valt at stilla eitt rættuliga ungt lið til kappingina í meistaradeildini hjá kvinnum. Tær eru nærum sama lið, ið eisini umboðar felagið í kvinnuunglingum, og má man siga at tær hava tað trupult við at skava sær stig saman í meistaradeildini. Havnagenturnar eru dugnaligar, men spurningurin er, um tær eru klárar til flogbólt í meistaradeildini. Óivað koma tær at læra eina rúgvu í hesum kappingarárinum, og fara tær eisini at mennast av hesum.




*Fleyrleikarar royna at blokka, men Katrin Petersen hamrar yvir blokkin og enn eitt stig er komið í skjáttuna til TB*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

### TB við aftur

TB, ið er mannað við sera ungum leikarum í ár hevur byrjað heldur trilvandi uppá kappingarárið. Tær hava mist fólk í mun til seinasta kappingarár, og hevur tað sett síni spor. Popovic systrarnar eru enn í TB, og tó. Tann eina noktar snøgt sagt at spæla, tí hon ikki fær pengarnar, og hin er júst komin úr barnsburðarfarloyvi, so tað er ikki optimalt, fyri at siga tað akra sum tað er.

Katrin Petersen, ið er ein av berandi kreftunum á unga TB-liðnum sigur at tað var ótrúliga deiligt at vinna aftur, og at dysturin ongantíð var í vanda fyri at gleppa teimum av hondum. – Vit spældu ein góðan dyst í dag, og allar kempaðu fyrimyndarliga, sigur Katrin Petersen og leggur afturat, at rætta liðið vann.

### Meira í væntu

TB hevur gamaní ikki fingið meira enn ein sigur enn í ár, men tær vóru nær við á heimavølli móti ÍF herfyri, tá tær noyddist at fara av vøllinum við tapi, men Katrin Petersen sigur at tær vóru nær við. – Vit spældu vælt á, og vóru nær við at vinna, men hepni var ikki við okkum, tær avgerandi løturnar, og tá gjørdist tungt. Men við sigrinum í gjár er kanska ein vend komin í. Lagið er gott og viljin er í hásæti. Tær yngru blíva betur og betur fyri hvønn dyst, sigur Katrin Petersen, ið var við til at avgera dystin í Havn móti Fleyr.

Fleyr – Mjølnir 0-3 (22-25, 15-25, 11-25):

# Mjølnir sveiggjar aftur

**Klaksvíkingar úr Mjølni vóru sunnudagin á vitjan hjá Fleyr í Havn. Dysturin var ein uppgerð millum nummarr fýra og fimm í meistaradeildini hjá monnum**

FLOGBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Mjølnir byrjaðu betur og tann gongdin tókst at halda fram. Tó vóru teir úr Fleyr, væl betur við í endanum av fyrsta setti og í byrjanini av øðrum setti. Tó skuldi tað vísa seg, at teir úr Mjølni vóru væl betur fyri og vunnu teir at enda sannførandi.

### Avgerandi løtan

Mjølnir vunnu tryggan 0-3 sigur sunnudagin, og var tað ongantíð veruligur vandi á ferð. Tó góvu Havnamenn úr Fleyr, teimum úr Mjølni dygga mótstøðu móti endanum á fyrsta setti. Hetta rakk tó ikki til meira enn at teir komu uppá eini trí stig á muni. Tí setti fall til Mjølnir, ið vann 22-25.

Næsta settið byrjaðu klaksvíkingar sum eitt óløgið. Teir struku avstað, og eftir lítlari løtu høvdu teir lagt seg á odda heili 9-1. Avgerðin tóktist vera komin, og restina av dystinum var kanska lættari enn tað fyrsta settið hjá Mjølnirs monnum. Seinna settið vann Mjølnir 15-25.

Triðja settið vunnu klaksvíkingar eisini, og hesuferð gjørdist um avhølving. Luftin var farin av Fleyr ballónini, og Mjølnir vann settið 11-25 og dystin 0-3.



*Mjølnir rakti hægri, vóru betur og sterkari, og vóru heilt einfalt betur enn Fleyr*
*Mynd: Álvur Haraldsen*